# Kemilux væl umtókt í oljuvinnuni í Skotlandi

**Tað gongur væl at selja vørurnar hjá Kemilux í skotsku oljuvinnuni. Vørurnar eru kappingarførar og av bestu dygd sigur skotski sølumaðurin hjá Kemilux Jason Lombston**

FØROYSKAR VØRUR
*Jan Müller*

Langt áðrenn føroyskar fyritøkur fóru at hugsa um at vera við í eini oljuvinnu her heima og seinni eisini uttan fyri landoddarnar hevur Kemilux í Havn roynt at marknaðarføra sína vørur í útlandinum, eitt nú í Skotlandi, har stóri oljuídnaðurin nú hevur brúkt føroysku reinsievnini í mong ár.

Jason Lombston arbeiðir fyri Kemilux Supplies í Abderdeen. Sosialurin hitti hann á oljuráðstevnuni herfyri. Jason vitjar javnan oljufeløg, borifeløg, oljuframleiðarar o.o. og vísir fram serstøku vørurnar frá Kemilux í Føroyum. Pápin, Mike Lombston hevur eisini selt Kemiluxvørur í mong ár. Hesi seinastu trý árini hevur so sonurin tikið sær av søluni.

Hann viðgongur, at kappingin er hørð, og at aðrar fyritøkur í vinnuni royna at eftirgera nógv eftirspurdu vørurnar hjá Kemilux, men tað ber ikki til. At vørurnar hjá Kemilux eru nógv eftirspurdar heldur Jason vera gott bæði fyri seg og fyri fyritøkuna í Føroyum. Tað ger, at ein er fúsur at brúka nógva orku uppá søluarbeiðið. Jason roynir alla tíðina at fáa samband við nýggjar kundar, og her er nógv at fara eftir, tá hugsað verður um, hvussu stór oljuvinnan er í Skotlandi

- Eg havi góðar vónir fyri framtíðina, tí tað er so stórur áhugi fyri vørunum hjá Kemilux, sum oljuídnaðurin eftir øllum at døma er nøgdur við.

Hann hevur sjálvur arbeitt umborð á boripalli áður, og tí veit hann, hvørji kemikaliur verða brúkt har og hvørjar kemiskar vørur tørvur er á.

Tað hevur tikið sína tíð at fáa góðkenning alla staðni fyri vørunum men nú hevur tað eydnast Kemilux at fáa vørur sínar góðkendar av avvarandi myndugleikum. Kemilux evnini eru sostatt loyvd at brúka alla staðni í oljuvinnuni. Tað verða annars sett sera strong krøv til slíkar vørur.

Vørurnar hjá Kemilux koma við Skipafelagnum til Scrabster og verða koyrdar til Peterhead.



*Jason Lombston er sølumaður fyri Kemilux Supplies í Skotlandi. Hann sær fyri sær eina bjarta framtíð hjá Kemilux í Skotlandi*

*Mynd Jan Müller*




8.30–9.00 **Registration and coffee**

OPENING ADDRESS
9.00–9.15 **Opening address**
EYÐUN ELTTØR,
*Minister of Petroleum*

SECOND LICENSING ROUND
9.15–9.30 **Second licensing round**
HERÁLVUR JOENSEN,
*Permanent Secretary of the Ministry of Petroleum*

THE ATLANTIC MARGIN IN CONTEXT OF NORTH WEST EUROPE DEVELOPMENT
9.30–9.55 **The future of the north Sea and BP's role in it**
CRAIG MCKENZIE,
*North Sea Projects PUL, BP*
9.55–10.20 **Atlantic Petroleum, a new player in North West Europe**
WILHELM PETERSEN,
*General Manager, Atlantic Petroleum*
10.20–11.00 **Coffee**
11.00–11.45 **Atlantic Frontier ... a 10-year perspective**
JEREMY CRESSWELL,
*Editor, The Press and Journal Energy Monthly*
11.45–13.00 **Lunch**
*During lunch the prize will be handed to the winner of the Petroleum Exploration Business Game Xplore*

THE CHALLENGE OF THE BASALT
13.00–13.15 **Future exploration issues of the Faroe Islands**
SIGURÐ Í JÁKUPSSTOVU,
*Director, Faroese Geological Survey*
13.15–13.40 **The basalt challenge – seeing through it, drilling through it**
GARETH ALLINSON,
*Exploration Manager Western Europe, Statoil*
13.40–14.00 **Coffee**

STATUS
14.00–14.30 **Still early days**
MAGNI ARGE,
*Faroe Oil Industries' Association*
**Status of exploration of the Faroese Area**
BEN ARABO,
*Faroe Oil Industry Group*

THE IMPACT OF MEGA-PROJECTS IN SMALL COMMUNITIES
14.30–15.00 **The impact of Mega-projects in small communities?**
KJARTAN ÓLAFSSON,
*Sociologist, University of Akureyri Research Institute*
15.00–15.15 **Magni Arge, Chairman of FOIA, concludes the day**
**Refreshment**

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Oljuvinnufelagið, c/o Vinnuhúsið,
Boks 1038, R.C. Effersøesgøta 30, FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 18 64 · Fax 31 72 78
industry@industry.fo · www.industry.fo

The Faroes Partnership

*„Vertshúsið" Niels Finsensgøta 32, in the centre of Tórshavn will be open for participants at Offshore Faroes 2003 Tuesday evening from 21.00.*

REPROZ





*Frá vinstru: Graham Stewart, Julian Riddick, Nils Sørensen, Bogi Vang og Teitur Poulsen*

# Leiðin til London kann loysa seg

**Føroya Kolvetni hevur gjørt tað sum einki annað føroyskt felag higartil hevur megnað: at gerast alment tøkt fyri útlendskar íleggjarar og tann vegin fáa til vega kapital til umfatandi virksemi í oljuvinnuni**

KAPITALUR
*Búi Tyril / PRnewsMedia.com*

Tað var ein langur og stundum seigur vegur, leiðin til Alternative Investments Market, AIM partabrævamarknaðin í London; tað kunnu Graham Stewart og Nils Sørensen ídag skriva undir uppá fyri Føroya Kolvetni. Men felagið hevur sett sær stór mál ið innibera nógvar milliónir í kapitalkravi.

Áðrenn listingina á AIM tann 27. juni 2003 varð eigarabygnaðurin í Føroya Kolvetni PF lagdur um via eitt bretskt felag, Faroe Petroleum PLC, ið bjóðaði at býta partabrøvini í Føroya Kolvetni um við partabrøv í Faroe Petroleum, soleiðis at partaeigararnir í Føroya Kolvetni blivu partaeigarar í Faroe Petroleum PLC.

Aftan á at umleið 90 milliónir fyrst vóru fingnar til vega gjøgnum privatar íløgur, og aftan á drúgvar fyrireikingar og bíðitíðir eftir røttum líkindum, eydnaðist tað at fáa Faroe Petroleum PLC alment skrásett og í tí sambandi fingust inn umleið 160 milliónir feskar krónur gjøgnum sølu av partabrøvum í felagnum – við øðrum orðum hevur felagið útvegað umleið 250 milliónir krónur til sítt virksemi.

Ein og hvør føroyskur vinnulívsmaður kann vátta at hetta ljóðar sum eitt ævintýr.

"Tú kanst kalla tað eitt ævintýr um tú vilt," segði Graham Stewart. "Fyri meg er luttøka í føroyskari oljuvinnu ein gamal dreymur sum bara gerst meira og meira veruligur."

## 'Bara ein byrjan'

Sum skilst hevur einki annað føroyskt felag fyrr gjørt sum Føroya Kolvetni og útvegað sær váðafúsan kapital gjøgnum eina børslisting: Ístaðin fyri at stara seg blindar í hvussu torført tað er at fáa fatur á veruligum kapitali á okkara leiðum, gjørdu Graham Stewart og Nils Sørensen nakað meira ítøkiligt við spurningin og vendu sær til kapitalmarknaðin í einum av heimsins størstu fíggjarligu miðdeplum.

"Oljuvinnan er ein altjóða vinna," viðmerkti Nils Sørensen, "so hví ikki venda sær til altjóða íleggjarar… Hetta er í grundini nakað sum fleiri kanska áttu at hugsað um at gjørt."

Faroe Petroleum hevur ídag so mikið sum ein fjórðing av føroysku leitiloyvunum 002 og 005, og arbeiðir samstundis við at finna aðrar hóskandi verkætlanir. Felagið fokuserar á Atlantsmótið sum fevnir um Føroyar, Írland, Stóra Bretland og Noreg og møguleikarnir har eru sum skilst ógvuliga nógvir.

Oljuvinnan verður ofta býtt upp í trý sløg av virksemi: leiting, menning av ómentum feltum, framleiðsla. Tey bæði fyrst nevndu bera í sær stóran váða men kunnu eisini geva einum felag stórar virðisøkingar.

"Vit leggja størsta dent á leiting og menning av ómentum feltum," staðfesti Graham Stewart. "Føroyar er okkara høvuðsøki innan leiting og vit koma at luttaka í nominering av økjum í sambandi við annað útbjóðingar umfar sum vit eisini ætla at luttaka í."

## Tosa føroyskt

Tá ið Faroe Petroleum PLC í sambandi við børslistingina varð gjørt til móðurfelag hjá Føroya Kolvetni, fór Graham Stewart úr starvi hjá Dana Petroleum fyri ístaðin at gerast stjóri í Faroe Petroleum. Samstundis er ein nýggjur professionellur nevndarformaður komin inn, Joe Darby, fyrrverandi stjóri í oljufelagnum Lasmo. Hetta felag hevur arbeitt nógv á Atlantsmótinum og var við í fyrsta útbjóðingar umfari í Føroyum. Joe Darby er eisini nevndarlimur í British Nuclear Fuels PLC. Umframt hann sita nú Graham Stewart, Nils Sørensen, og Meinhard Jacobsen frá Føroya Fiskavirking í nevndini hjá Faroe Petroleum PLC.

Høvuðsskrivsstovan hjá Faroe Petroleum liggur í Aberdeen, á Carden Place 24, eitt øki har fleiri oljufeløg og ráðgevingarfeløg halda til. Men tann føroyski samleikin er alla tíðina nærverandi í Skotlandi.

"Sjálvt um skrivstovan liggur í Aberdeen so verður tosað nógv føroyskt her," helt Nils Sørensen fyri.

Tá Føroya Kolvetni varð stovnað í 1997, var Nils Sørensen einasti persónur knýttur at felagnum í føstum starvi. Í dag arbeiða átta fólk hjá felagnum í Aberdeen og Tórshavn. Bogi Vang, útbúgvin sum Chartered Accountant hjá Deloitte & Touche, er nýliga settur í starv; harafturat hevur t.d. búskaparfrøðingurin Teitur Poulsen arbeitt hjá felagnum tey seinastu árini.

"Vit royna at hava so lítlan og professionellan starvsfólkahóp sum møguligt og keypa okkum síðani tær tænastur vit hava brúk fyri," greiddi Graham Stewart frá. "Hóast vit hava ein altjóða eigarabygnað, leggja vit okkum eftir at nýta føroysk starvsfólk við røttum førleika innan oljuvinnuna."

## Aðrar reglur

At leiðin inn á partabrævamarknaðin í London mátti ganga umvegis eitt felag undir eingilskari lóg, eigur ikki at koma óvart á mong. Tað hevur hetta seinasta árið fleiri ferðir verið frammi alment at føroysk vinnulóggáva enn ikki er búgvin til tey krøv ið stórir íleggjarar seta, ikki minst hvat krøvum um roknskap viðvíkur.

Greiðar og væl kendar eingilskar reglur fyri roknskap og skatt umframt onnur viðurskifti so sum gjaldoyra, gjørdu at loysnin við Faroe Petroleum PLC sum eigarafelag uttan iva var tann tryggasti og mest einfaldi mátin at gjøgnumføra eina børslisting uppá.

Loysnin inniber millum annað at partaeigararnir í Føroya Kolvetni ístaðin gerast partaeigarar í Faroe Petroleum PLC sum í sínum lagi yvirtekur øll partabrøvini í Føroya Kolvetni. Við øðrum orðum: átti tú partabrøv í Føroya Kolvetni, so kanst tú hava gjørt kvettið.